# Móttøka av seyðaskinnum

Móttøkan av seyðaskinnum byrjar á Royndarstøðini í Kollafirði mánadagin 28. november 2005, og verður tikið móti skinnum frá mánadegi til fríggjadag kl. 9 til 17. Seinasti dagur, tikið verður móti skinnum, er fríggjadagur 9. desember.

Tikið verður móti skinnum samb. **K. nr. 119**
**Kunngerð um útflutning av seyðaskinnum og neytahúðum til Evropeiska Samveldið (ES) frá 18. november 2005.**

Kunngerð sigur m.a.:
**§2 stk. 2** *Viðgjørd seyðaskinn og neytahúðir, sum ætlanin er at útflyta til ES, skulu ikki stava frá:*

1) *Seyði ella neytum, sum hava klinisk tekin um sjúku, ið kann smitta dýr ella menniskju*
2) *seyði ella neytum, sum eru slátrað í samband við niðurberjing av epizootiskari sjúku*
3) *seyði, sum stavar frá garði ella hagaparti, har klinisk tekin hava verið um ridluskriða (scrapie) seinastu 3 árini*

Kunngerðin sigur eisini:
**§3** *Tá viðgjørd seyðaskinn og neytahúðir verða latin góðkendari móttøku, ella tá sending við viðgjørdum seyðaskinnum og neytahúðum verða innsiglað, skal eigarin undirskriva eina váttan samb. fylgiskjali 1.*

Nevnda fylgiskjal kann útskrivast frá heimasíðu okkara www.mbm.fo, ella umbiðjast frá móttøku okkara, telefon 309000.

Gjørt verður vart við, at um omanfyristandandi áleggingar ikki kunnu góðkennast við útfylling og undirskrift av fylgiskjali 1, **verður ikki tikið móti hesum skinnum.**

MBM Hoyvík 23. november 2005




ENDAMÁL
Endamálið við skeiðnum er at kunna luttakararnar um nýggju barnaverndarlógina, og greiða frá, hvussu fosturforeldur kunnu bera seg at mótvegis fosturbørnum og foreldrum teirra.

SKEIÐSINNIHALD
Á skeiðnum verður ein stutt gjøgnumgongd av nýggju barnaverndarlógini, serliga við atliti at broytingunum, sum hava týdning fyri fosturforeldur.

Síðani verður greitt frá, hvussu móttøkan, samveran og skilnaðurin millum fosturforeldur og fosturbarn kunnu greiðast. Eisini verður komið inn á samstarvið millum fosturforeldur og biologisk foreldur.

UNDIRVÍSINGARHÁTTUR
Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar og bólkaarbeiði.

LUTTAKARAR
Skeiðið er ætlað øllum teimum, sum hava børn til fosturs.

TÍÐ
03. desember 2005 frá kl. 09.30 til 17.00.

STAÐUR
Hotel Føroyar, Tórshavn.

FREIST
Tilmeldingarfreistin er mikudagin 30. november 2005.

TILMELDING
Tilmelding á ad@lawfirm.fo
telefaks 31 62 25 ella telefon 21 24 97.

UNDIRVÍSARI
Ásvør Skaalum, sálarfrøðingur

Skeiðið er ókeypis.

**Barnaverndarstova Føroya**
R.C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

REPROZ

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Handilshøli til leigu

Handilshølini í Sverrisgøta 7 og N. Finsensgøtu 7 verða lýst til leigu frá 1. januar og 1. februar 2006.

Hølini eru ávíkavist 25 og 38 fermetrar til víddar.

Tórshavnar kommuna ynskir, at handilsfyritøkur, sum leiga høli í miðbýnum, skulu verða við til at menna og skapa trivnað í miðbýnum. Viðkomandi umsøkjari verður biðin um at gera eina lýsing av sínari handilsfyritøkuni.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Katrina S. Nielsen ella Jens M. Poulsen tlf. 302010.

**Umsókn**
við upplýsingum skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. desember 2005 kl. 12.00.



www.torshavn.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4085**
**Navn:** Sp/f Á Rætt
**Adressa:** 410 Kollafjørður
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 11-11-2005
**Viðtøkudato:** 11-11-2005
**Stovnarar:**
Erland Hammer, 410 Kollafjørður
**Stjórn:**
Erland Hammer, 410 Kollafjørður, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, skrás.grannsk, J. Broncksgøta 16, Box 16, 110 Tórshavn
**Partapeningur:**
kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum.
**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka handverk og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
11.11.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 18. november 2005*

*Kristin Balle*

EvR Evangeliska Røddin




# Ein fløga frá EvR
- ein góð jólagáva

| | |
|---|---|
| Ólavur á Váli - NÝGGJ *(tvífløga)* | **kr. 189,-** |
| Petur W. Háberg *(tvífløga)* | **kr. 189,-** |
| Ebenezerkórið | **kr. 169,-** |
| Sangbrøður | **kr. 159,-** |
| Triple Trio | **kr. 149,-** |
| Tey á Váli | **kr. 149,-** |
| M.C. Restorff, Nýtt og gott gamalt | **kr. 149,-** |
| M.C. Restorff, Í nýggjum búna | **kr. 149,-** |
| Dupultkvartettin í Ebenezer | **kr. 149,-** |

*Fáast í fløguhandlunum*

Evangeliska Røddin
**evr.fo**

Sosialurin 341800

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo